UTTAN ÚR HEIMI



*Yvirgangsfelagsskapirnir leggja seg eftir plássum, har nógv fólk eru. Hendan myndin er av Ráðhúsplássinum í Keypmannahavn*

# Danmark verður álopið næstu ferð

**Verða teir donsku hermenninir ikki tiknir úr Irak, er Danmark tað næsta landið, sum kann vænta eitt yvirgangsálop, sigur ein bólkur hjá al-Qaeda.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Fyri aðru ferð í átta dagar verður Danmark nú ávarað um eina møguliga yvirgangsatsókn. Tann fyrra ávaringin kom sama dag, sum bumburnar brustu í London, og í gjár kom aftur ein ávaring.

-Hetta er ein ávaring til øll evropeisk lond, men fyrst og fremst Danmark, sum framvegis hava hermenn í muslimskum londum. Eingin skal kenna seg tryggan í londum tykkara, so leingi tykkara hermenn og drápsmenn eru í muslimskum londum, stendur í ávaringini, sum er frá bólkinum Abu Hafs al-Masri Brigades.

Hesin bólkurin er ein partur av al-Qaeda, og tað var hann, sum játtaði at hava skipað fyri bumbuatsóknini í Madrid tann 11. mars í fjør. Bólkurin takkar samstundis Allah fyri góða hjálp í sambandi við atsóknina í London í síðstu viku.

Amerikanski yvirgangsserfrøðingurin Rita Katz segði við Jyllandspostin í gjár, ávaringin skal neyvan takast í fullum álvara. Hon heldur ikki, at bólkurin er ein hóttan ímóti Danmark og vísir á, at Abu Hafs al-Masri Brigades hevur átikið sær ábyrgdina av næstan øllum yvirgangsatsóknum kring heimin hetta seinasta árið.

-Hinvegin er tað vert at leggja merki til, at Danmark nú verður nevnt fleiri ferðir sum álopsmál, og tað kann hava við sær, at víðgongdir persónar fara at fyrireika eina atsókn, tí teir halda, at Al-Qaeda hevur vælsignað og góðkent tað, sigur Rita Katz við Jyllandspostin.

# Gjørdu sær dælt av bumbunum í London

**Stóru bretsku fyritøkurnar BP og Vodafone keyptu egin partabrøv fyri milliardir, tá bumburnar fingu virðið at fella.**

BUSINESS
*Árni Joensen:*
*fartekst@maildk*

Leiðslan á børsinum í London umhugsaði at steðga øllum handli við partabrøvum aftan á bumbubrestirnar seinasta hósdag, men gjørdi kortini av at lata standa til. Bumburnar fingu virðið at fella, og tað gjørdu oljufelagið BP og telefonfelagið Vodafone sær dælt av við at keypa egin partabrøv fyri lutfalsliga lítlan penga. Eitt nú keypti BP tvær ferðir so nógv egin partabrøv seinasta hósdag sum allan tann seinasta mánaðin frammanundan.

Danska blaðið Børsen skrivar, at framferðin hjá BP og Vodafone hevur fingið fólk at spyrja, hvar markið ímillum etikk, moral og ísakalda kapitalismu er.

Tá USA bleiv álopið tann 11. september í 2001 bleiv børsurin í London stongdur, men tað bleiv so ikki gjørt hesaferð.

## Havnirnar ikki nóg tryggar

Aftan á yvirgangsatsóknina tann 11. september í 2001 gjørdi ST av at herða trygdarreglurnar í teimum havnum, sum taka ímóti fremmandum ferðamannaskipum. Í Noregi eru 516 havnir, sum fáa útlendsk skip á vitjan, men nú vísir ein uppgerð, at bara 261 teirra hava framt tey tiltøkini, sum myndugleikarnir hava kravt.

Upprunaliga fingu tær norsku havnirnar boð um at fremja tey neyðugu tiltøkini innan tann 1. juli í fjør, men nú so nógvar eru farnar langt út um tíðarfreistina, ætla myndugleikarnir at fara harðari til verka, skrivar Aftenposten. Um stutta tíð fáa havnirnar eitt ávaringarskriv, og verða tiltøkini ikki sett í verk, kunnu havnirnar missa rættin til at taka ímóti fremmandum skipum. Tað kann fáa álvarssamar avleiðingar fyri havnirnar.

Herbent Francke, sum arbeiðir hjá einum ráðgevingarfelagi, sigur við Aftenposten, at nógvar norskar havnir hava fingið góðkenning, sjálvt um tær ikki hava framt tey neyðugu tiltøkini. Eitt nú er tað lætt hjá óviðkomandi at sleppa umborð á eitt fremmant ferðamannaskip og í land aftur, sigur hann og leggur afturat, at hetta hevur hann sæð í fleiri av teimum stóru norsku havnunum.

Hann fýlist eisini á, at starvsfólkini í havnunum leggja ov lítlan dent á trygdina. Nógvar havnir eru avbyrgdar við høgari girðing, soleiðis sum reglurnar siga, men tað nyttar einki at hava eina høga girðing, tá portrini standa opin, sigur Herbert Francke við Aftenposten.

## Nógv doyggja í ferðsluni

Tann seinasta vikan hevur roynst illa í donsku ferðsluni, tí hesar dagarnar hava ikki færri enn ellivu fólk latið lív í ferðsluvanlukkum.

Minst ein av vanlukkunum hevði samband við rúsdrekka, og í einum føri var talan um alt ov nógva ferð. Enn einaferð hevur tað víst seg, at fleiri ung koyra alt ov skjótt, og tað hevur fingið danska ráðið fyri ferðslutrygd at skipa fyri einum reklamuátaki, sum skal fáa tey ungu at seta ferðina niður.

Danskir ferðslugranskarar hava sagt, at umleið hundrað mannalív kundu verið spard árliga, um bilførarar halda seg innan fyri ta loyvdu ferðina.

## Ferðafólk til Vietnam

Vietnam er vorðið eitt væl umtókt ferðamannafólk, og talið á fremmandum ferðafólki veksur støðugt.

Blaðið Than Nien skrivar, at fyrra hálvár í ár vóru næstan 1,8 millión útlendsk ferðafólk í Vietnam, og tað var næstan 24 prosent meiri enn í sama tíðarskeiði í fjør. Tað eru serliga amerikanarar, sum hava hug at vitja landið, har amerikanskir hermenn bardust fyri ikki so mongum árum síðani. Higartil í ár hava 167.000 amerikanarar vitjað í Vietnam, og tað er næstan 20 prosent meiri enn fyrra hálvár í fjør, skrivar Than Nien.

Eisini norðurlendingar hava fingið hug at halda frí í tí fjarskotna landinum. Sambært Ritzau hava 21 prosent fleiri danir vitjað landið higartil í ár enn um somu tíð í fjør. Fyrr kravdu teir vietnamesisku myndugleikarnir, at donsk ferðafólk skuldu hava visum fyri at vitja, men tað kravið varð slept tann 1. mai í ár.

## Ov heitt at arbeiða

Tað hevur verið rættiliga heitt í Danmark og Noregi teir seinastu dagarnar, og tey eru mong, sum fegin vildu havt frí heldur enn at sita inni á teimum heitu skrivstovunum.

Ein kanning hjá danska sjónvarpinum DR vísti, at fleiri hildu, at arbeiðsgevarin átti at geva teimum frí, tá hitin nærkast teimum 30 stigunum, tí tá er alt ov heitt inni. Men ein talsmaður hjá arbeiðseftirlitinum segði við sjónvarpið, at reglurnar siga einki um, hvussu heitt tað skal vera, fyri at fólk ikki kunnu arbeiða innandura longur.

Tað sama svarið fáa teir norðmenn, sum sveitta inni á skrivstovunum. Har sigur arbeiðseftirlitið kortini, at hitin á skrivstovunum eigur at liggja um 22 stig, og at arbeiðsgevarin skal tryggja, at hann ikki fer upp um 26 stig. Men hinvegin sigur lógin einki um, nær fólk eiga at fáa frí av hita, sigur norska arbeiðseftirlitið sambært Aftenposten.